# Pisurnar fara skjótt

**Meginfelag Føroyskra Studenta skipaði sunnudgain saman við Altjóða Skrivstovuni fyri pisufundi í Miðlahúsinum. Endamálið við fundinum er at kunna tey, sum skulu av landinum í lestrarørindum, um tey ymsu viðurskiftini í sambandi við lesturin og gerandisdagin sum lesandi**

ÚTBÚGVING
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*– Vit arbeiða fyri øllum teimum føroysku lesandi kring knøttin, og vit vilja sjálvandi heita á fólk um at gerast limir í MFS, siga tær báðar Katrin Apol og Nina Arge frá Meginfelag Føroyskra Studenta*

Katrin Apol og Nina Arge frá MFS siga, at tað eru eitt sindur færri fólk við hetta árið enn undanfarin ár. Hetta kemst kanska av veðrinum og Summar Festivalinum í Klaksvík.

– Tiltakið gekk fínt. Fólk spurdu kanska ikki so nógv í byrjanini, men tá tað kom til ítøkilig ivamál, so vóru tey meira áhugaði í at spyrja. Serliga tey sum fara aðrastaðni enn til Danmarkar hava ivamál um nýggja lesturin og lívið sum lesandi í nýggja umhvørvinum, siga tær, siga tær báðar Katrin Apol og Nina Arge frá MFS.

– Mentanarhvøkkurin er ein týðandi táttur, tí hesin virkar báðar vegir. Fólk skulu minnast til, at hetta gongur yvir. Men tað er greitt, at tað kemur óvart á. Tað er nógv fólk, sum hugsa, at tey kenna alt til tað danska. Men tað er nakað annað at vera í tí sjálvur, siga Katrin Apol og Nina Arge.

– Vit mugu eisini ávara føroyingar um at fara í verjustøðu. Hugburðurin má ikki vera, at man skal verja tað føroyska, og at man er ímóti tí fremmanda. Ístaðin eigur man at vera opin fyri tí nýggju mentanini, heldur enn at fara í verjustøðu og halda at tað føroyska er tað besta. Tey nýggju lesandi eiga at vera móttakandi og síggja positivt upp á tað, staðfesta Katrin Apol og Nina Arge.

– Vit royna eisini at heita á fólk um at luttaka. Vit eiga ikki at vera afturhaldandi, men heldur seta spurningar og luttaka aktivt í tí sosiala kring lesturin. Vit heita á fólk um at leypa út í tað. Umframt hetta er tað týdningarmikið at strukturera sín arbeiðsdag og fáa eina rutinu í gongd, siga tær báðar Katrin Apol og Nina Arge frá MFS.



*Eini 60 fólk vóru møtt upp í Miðlahúsinum sunnudagin til pisufundin hjá MFS og Altjóða Skrivstovuni*

## Fá dupult stig

Um tað ikki eydnaðist tær at koma inn á ynsktu útbúgvingina, so kanst tú fara uttanlanda at arbeiða ella á háskúla fyri at betra um møguleikarnar á kvotu 2.

Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni sigur, at vinnuligt arbeiði ella háskúlauppihald uttanlanda í seks mánaðir gevur dupult stig, tá søkt verður gjøgnum kvotu 2 í Danmark.

Harumframt kann stuðul fáast til háskúlan. Sum danskur ríkisborgari ber til at søkja um stuðul upp til kr. 700 um vikuna til eitt uppihald á fólkaháskúla í øðrum norðanlandi. Søkjast kann á www.ciriusonline.dk.

Tað er eisini vert at vita, at Nordiska folkhögskolan Kungälv (www.nordiska.fhsk.se) bjóðar teimum fyrstu fimm føroyingunum eitt hálvt fríplass.

### Enn eru pláss eftir á hægri lærustovnum

Ávísar útbúgvingar á hægri lærustovnum taka framvegis næmingar inn, tí enn er ikki fult. Holger Arnbjerg á Altjóða Skrivstovuni sigur, at um tað ikki eydnaðist at koma inn á dreymaútbúgvingina, ella um tú brádliga leingist at fara víðari í skúla, so er ein glotti fyri framman.

Til dømis í Danmark, Noregi, Svøríki, og Bretlandi eru framvegis tøk pláss. Royn hesar leinkjur fyri at fáa meira at vita:

www.ug.dk/uvm-images/KOTledigepladser2005.pdf

http://solan.uio.no/restetorget

www.studieplatser.nu

http://www.ucas.com/clearing